# Kvinnur í Suðuroy tosa um at stíga fram

**Í kvøld verður almennur fundur fyri kvinnur í Suðuroy, har tær fara at tosa um politikk. Fundurin er serliga ætlaður kvinnuligu valevnunum til kommunuvalið, men allar eru vælkomnar**

Kvinnur og politikkur
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Annika Wardum Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini, at siga frá um javnstøðu og kvinnuumboðan í politikki á almennum fundi fyri kvinnum í Suðuroy í Hovs Skúla í kvøld klokkan 19*

Í kvøld verður ein forvitnisligur fundur fyri allar kvinnur í Suðuroy. Tað er ein fundur, sum verður um politikk í skúlanum í Hovi í kvøld klokkan 19.00.

Hetta er serliga ein fundur fyri tær kvinnur, sum stilla upp til bygda- og býráðsvalið í komandu viku. Men fyrireikararnir leggja dent á, at allar kvinnur eru meiri enn vælkomnar.

À fundinum fara Ásgerð Stenberg, býráðslimur í Vági, Katrin Joensen, bygdaráðslimur í Hvalba, og Karolina Enni fyrrv. býráðslimir á Tvøroyri, at greiða frá teirra royndum í býráðsarbeiði.

Samstundir fer Annika Wardum Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini, at siga frá um javnstøðu og kvinnuumboðan í politikki.

At enda verður bólkaarbeiði, har tveir spurningar verða viðgjørdir:

"Hvussu gerast meira sjónligar í politiska arbeiðnum og hvussu er at stíga fram?"

Orðstýrari verður Durita Brattaberg. Ein drekkamunnur verður at fáa á fundinum, sum endar umleið kl 22.30, sigur Marjun Olsen á Tvøroyri, sum er ein av fyrireikarunum.

### Kvinnubólkur

Annars hava fyrireikarnir gjørt ein bólk, ið virkar fyri javnari kynjaumboðan í føroyskum politikki. Eitt nú vóru limirnir í bólkinum á ráðstevnu fyri kvinnuligum parlamentarikarum í Útnorðri, sum Løgtingsskrivsstovan skipaði fyri 25. og 26. august 2004 í Havn.

Seminarið er eitt ítøkiligt úrslit av einum tilmæli hjá Útnorðurráðnum.

Í bólkinum eru løgtingskvinnurnar Annita á Fríðriksmørk (E), Heidi Petersen (E) og Lisbeth L. Petersen (B). Býráðslimur Elin Lindenskov (C), Rúna Sivertsen (A), Marjun Olsen (B), Charlotta á Váli Olsen (H) og Malan Johansen, (D), Annika W. Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini og Bjørt Samuelsen, Miðlan.

Tórbjørn Jacobsen:

# Eg skal berast út

**Tórbjørn Jacobsen fer ikki góðvilliga úr tjóðveldisflokkinum**

FLOKSÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tórbjørn biðjur um umbering og vónar at semjan frá hóskvøldinum kann standa við*

Tórbjørn Jacobsen fer ikki góðvilliga úr tjóðveldisflokkinum.

Tað ger hann púra greitt.

Hann metir, at hann framvegis hevur líka nógv at arbeiða fyri í tjóðveldisflokkinum, sum hann altíð hevur havt og tí fer hann ikki at siga seg úr flokkinum.

– Men verðið er koyrdur úr flokkinum, er tað ikki nógv, eg kann gera við tað, leggur hann afturat

Hann vónar kortini ikki at so er.

Hann góðtekur ikki, at semjan, sum varð gjørd hóskøldið verður tulkað sum ein treytaleys umbering og at hann tekur alt í seg aftur.

Tað gjørdi hann vart við í Rás 2 seinnapartin fríggjadagin og í Dimmalætting leygardagin.

Men í Dimmalætting verður hann eisini endurgivin fyri at draga ósemjuna ímillum Team 85 og tjóðveldisflokkin upp í málið.

– Tórbjørn Jacobsen sigur í lesarabrævi aðrastaðni í baðnum í dag, at tað er ein misskiljing.

Hann uppfataði hendan partin av samrøðuni við Dimmalætting sum túnatos, sum als ikki skuldi í blaðið.

Og í dag biðjur hann Høgna Hoydal um treytaleysa umbering fyri tann partin í greinini í Dimmalætting leygardagin, sum hevur við Team 85 at gera.

– Sostatt vóni eg, at semjan, sum vit gjørdu hóskvøldið, kann standa við, so at vit koma burturúr hesum, sigur Tórbjørn Jacobsen sum ikki ætlar sær at gera fleiri viðmerkingar til støðuna.

# Tórbjørn Jacobsen tikið seg úr tjóðveldisflokkinum

**– Tað er mín greiða fatan, at Tórbjørn Jacobsen hevur tikið seg úr Tjóðveldisflokkinum, sigur Høgni Hoydal, floksformaður**

FLOKSÓSEMJA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Eg helt at hendan ósemjan endaði hóskvøldið. Men Tórbjørn Jacobsen blívur við og tí hevur hann nú sett seg sjálvan uttanfyri tjóðveldisflokkin á tingi, sigur Høgni Hoydal*

Tórbjørn Jacobsen hevur sett seg sjálvan úr tjóðveldisflokkinum.

Tað er tann greiða fatanin hjá Høgna Hoydal, floksformanni.

Men hann vil ikki so so nógv um málið í løtuni.

Tórbjørn Jacobsen kom í rættiligt ódnarveður, tá ið hann skrivaði tvey lesarabrøv í Sosialinum, har hann førdi fram rættiliga álvarsamar ákærur ímóti sínum egna floksformanni, Høgna Hoydal.

Men tað eydnaðist at grava stríðsøksina aftur og tað endaði við eini semju ímillum teir báðar hóskvøldið.

Men blekkið var ikki meiri enn torna í semjuni ímillum Tórbjørn Jacobsen og Høgna Hoydal, so var aftur eldur í.

Útvarpið legði semjuna út sum eina umbering frá Tórbjørn Jacobsen og at hann hevði tikið allar skuldsetingarnar aftur.

Hetta afturvísti Tórbjørn Jacobsen fyrst í Rás 2 fríggjadagin og síðani í Dimmalætting leygardagin. Í Dimmalætting dróg hann fram eitt nýtt dømi um, hvussu manipulerandi, hann heldur Høgna Hoydal vera og sipar til umstrídda málið ímillum Team 85 og Tjóðveldisflokkin.

### Kann ikki liva við hesum

Høgni Hoydal sigur, at nú Tórbjørn Jacobsen aftur er farin í bløðini, má tjóðveldisflokkurin taka málið uppaftur og so má tað viðgerð innanfloks, sum tað skal hava.

Sostatt vísur hann eisini aftur, at talan er um eitt persónsmál.

– Hetta er eitt mál fyri allan flokkin. Tá ið slíkt hendir í einum politiskum flokki, er tað ein trupulleiki hjá øllum flokkinum. Og flokkurin kann ikki liva við støðuni, sum hon er.

Men hann endurtekur, at tað er heilt burtur úr vón og viti, at eitt mál sum hetta fær loyvi til at vera uppi, tí tað ávirkar øll tey mongu, sum arbeiða fyri flokkinum.

– Og sjálvur kann eg heldur ikki liva við at hava slíkar skuldsetingar hangandi yvir høvdinum.

Tórbjørn Jacobsen hevur skuldsett fyri at manipulera og mangt annað, í einum lesarabrævi. Hann hevur sagt, at hann føldi seg noyddan at skriva viðmerkingina, tí hann helt, at tú av órøttum hevði gjørt allan flokkin til talirør fyri skrásettum parlagi, hóast meiningarnar innanfloks eru sera ymiskar um málið?

– Tað er ósatt. Tvørturímóti havi eg alla tíðina lagt dent á, at tað, eg sigi um skrásett parlag, er mín egna hugsan. Tjóðveldisflokkurin á tingi hevur viðgjørt málið á nógvum fundum og har eru vit samd um, at flokkurin hevur onga felags støðu til málið, men at tað stendur hvørjum tinglimi frítt at hava sína støðu.

Men Høgni Hoydal heldur, at tað avgerandi er, at Tórbjørn Jacobsen hevur ongantíð tosað við hann um málið, áðrenn hann leggur so hart eftir honum í bløðunum og tað er ikki til at liva við.

Høgni Hoydal vísir eisini á, at í semjuni hevur Tórbjørn Jacobsen skriva undir uppá, at hann harmast um skrivingina ímóti Høgna Hoydal og so kann hvør tulka tað sum eina umbering ella ikki.

Hann vísur eisini á, at fyri floksins skyld helt hann, at málið endaði við semjuni hóskvøldið og at tey høvdu gjørt eina striku í sandin og kundu líta frameftir.

– Men longu dagin eftir rør Tórbjørn Jacobsen longu aftur í pottinum og tað kunnu vit ikki liva við.

### Sigur meiri um Tórbjørn

Í einum lesarabrævi í blaðnum í dag sigur Tórbjørn Jacobsen, at tú varð fyrstur at bróta semjuna við at nokta fyri at hann varð afturvaldur til næstformann í flokkinum.

Semjan 28. oktober sigur onki um næstformannin. Tað var Tórbjørn Jacobsen, sum sjálvur segði seg frá sum næstformann og tá ið nýggjur formaður skal veljast, er tað sjálvsagt, at eg sigi mína hugsan. Men tað sigur meiri um Tórbjørn Jacobsen sjálvan enn um nakran annan, at hann, undir slíkum umstøðum sum hesum, vil vera næstformaður aftur, beint eftir, at hann sjálvur hevur sagt seg frá.

Men í lesarabrævi í dag biðjur Tórbjørn Jacobsen teg um treytaleysa umbering fyri partar av tí, hann er endurgivin i Dimmalætting fyri leygardagin.

– Tað má vera eitt mál ímillum hann og blaðmannin á Dimmu er tað stutta svari frá Høgna Hoydal.



# Einki við okkara hugskot at gera

**Høgni Hoydal heldur fast um, at tað er langt ífrá hugskotinum, sum hann hevði til lýsing á valdegnum til tað, sum var at síggja í Sosialinum 30. apríl 2002**

SAKARMÁL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*– Ætlanin var, at hendan á skemtiligan hátt skuldi koyra uppá, um politiska valdið var í Danmark ella Føroyum. Men talan var so als ikki um at koyra upp á nakran etniskan mun millum føroyingar og danir, sigur Høgni Hoydal millum annað*

*Savnsmynd*

Eitt av teimum heilt nógv umtalaðu rættarmálunum seinastu tíðina fekk ein enda, tá Føroya Rættur herfyri dømdi Tjóðveldisflokkin at rinda so at siga fullu upphæddina fyri lýsingarherferðina, sum lýsingarstovan, Team 85, gjørdi fyri flokkin áðrenn løgtingsvalið 2002.

Í sentrum í trætumálinum var ein lýsing, sum Team 85 hevði sett í Sosialin á sjálvum valdegnum, men sum Tjóðveldisflokkurin als ikki vildi kennast við.

Lýsingarstovan átók sær eisini alla ábyrgd av lýsingini dagin eftir. Høgni Hoydal staðfesti, at hann so einki til lýsingina, áðrenn hon var í blaðnum, men alt var ikki liðugt av teirri orsøk. Tjóðveldisflokkurin noktaði nevnliga at rinda fulla upphædd fyri lýsingarnar, sum Team 85 hevði gjørt fyri flokkin, og tí varð flokkurin seinni stevndur.

### Einki við hugskotið at gera

Eitt av argumentunum fyri, at Tjóðveldisflokkurin ikki vildi gjalda fyri lýsingina var, at tey mettu umrøddu lýsingina hava skatt valdystin fyri teirra viðkomandi. Hartil varð í rættinum sagt, at samlaði kostnaðurin av lýsingararbeiðinum var væl omanfyri tað, sum partarnir høvdu avrátt, og hetta var flokkurin ikki sinnaður at gjalda.

Í Dimmalætting í gjár verður sagt, at Høgni Hoydal kendi til lýsingina, sum var í Sosialinum á valdegnum. Millum annað verður víst til vitnisfrágreiðingina í rættinum: »Det passer, at han havde talt med Hannis Egholm (táverandi kreativur leiðari á Team 85, blðm.) om en karikaturtegning, hvor statsministeren holdt Lisbeth Petersen og Jóannes Eidesgaard i hånden. De var i tidsnød. Han foreslog, at der blev lavet noget med nogle billeder, og det skulle være humoristiskt. Der blev intet sagt om noget etnisk.«

Men sambært Høgna Hoydal hevur hetta einki at gera við lýsingina, soleiðis sum hon sá út valdagin.

– Tað passar, sum tað stendur, at vit tosaðu um at gera eina keiputekning, staðfestir Høgni Hoydal.

– Ætlanin var, at hendan á skemtiligan hátt skuldi koyra uppá, um politiska valdið var í Danmark ella Føroyum. Vit komu eisini í tíðarneyð, og tí varð tosað um at gera okkurt við myndum, men talan var so als ikki um at koyra upp á nakran etniskan mun millum føroyingar og danir. Tað er ein trupulleiki, sum vit í Tjóðveldisflokkinum hava barst ímóti í fleiri ár. Hetta at fólk siga, at okkum ikki dámar danir, hvørja ferð vit tosa um loysing kontra samband. So eg kann bara enn einaferð siga, at eg taki frástøðu frá hasi lýsingini.

So tað var so ikki hatta slagið av skemti, sum tit høvdu í huganum?

– Handan lýsingin hevur so einki við skemt at gera. Og sum málið er framlagt í rættinum, so undrar tað meg bara enn meira, at hon kom í blaðið. Sagt varð, at lýsingin varð send aftur, tí stavivillur vóru í henni, og tað burdi so fingið onkran at sagt okkum frá. Eg fekk annars allar aðrar lýsingar til góðkenningar, men hasa sá eg ongantíð, sigur Tjóðveldisformaðurin.

### Lýsingin var orsøkin

Spurdur, hvørt tað var hendan lýsingin ella samlaða upphæddin fyri lýsingarherferðina, sum var orsøk til sakarmálið, sigur Høgni Hoydal, at fremsta orsøkin var lýsingin.

– Hon er beinleiðis orsøkin til, at vit ikki vildu gjalda. Vit meta, at hetta skaddi valdystin hjá okkum, men rætturin hevur so staðfest, at slíkt er trupult at máta, og tí eru vit dømdir at gjalda fullu upphæddina. Tað einasta, sum eg kann fegnast um í hesum er, at øll mannagongdin viðvíkjandi ger av hasi einu lýsingini nú er lýst til fulnar. Og at tað er staðfest, at tað ikki vóru vit, sum vóru atvoldin til hana, sigur Høgni Hoydal at enda.

# Dómurin tala fyri seg

**Stjórin á Team 85 hevur lítlan hug at fara út í almenningin at kjakast um, hvat hendi við so nógv umrøddu lýsingini til valdagin**

SAKARMÁL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir drúgva sakarmálið móti Tjóðveldisflokkinum um gjald fyri lýsingarherferðina til løgtingsvalið á vári 2002, tykist Johnny Gaard, stjóri á Team 85, at hava lítlan hug at geva málinum enn meira viðgerð í fjølmiðlunum.

– Tað einasta, sum eg kann siga, er, at tað fyri okkum sum ein privat fyritøka er øgiliga keðiligt at verða drigin inn í eitt politiskt sakarmál ímóti einum politiskum flokki. Og har flokkurin sjálvur ikki góðtekur dómin.

– Fyri okkara viðkomandi endaði málið í rættinum, og har fingu vit fult viðhald, er einasta viðmerkingin, sum Johnny Gaard hevur til málið. Í aðrar mátar vísur hann til dómsúrskurðin, sum kann lesast á heimasíðuni: www.team85.fo.

Av hesum framgongur eisini, hví Team 85 á valdegnum valdi at taka ábyrgd av lýsingini.

Sambært úrskurðinum, so vóru tað so hvørki Jóannes Eidesgaard ella Lisbeth L. Petersen, sum kravdu nakra umbering. Tað gjørdi Tjóðveldisflokkurin hinvegin, men í fyrsta umfari noktaði lýsingarfyritøkan blankt fyri hesum.

Ikki fyrr enn Tjóðveldisflokkurin dagin eftir í Útvarpinum boðaði frá, at tað ikki vóru tey, men »lýsingarfyritøkan«, sum hevði staðið fyri lýsingini, valdi Johnny Gaard at traðka fram og taka ábyrgd av lýsingini. Hetta tí hann ikki vildi hava, at allar lýsingarstovur í býnum kundu leggjast undir hetta, og tí hann óttaðist reaktiónirnar, sum hesar fóru at hava til málið, framgongur tað av dómsúrskurðinum.


